**Semja**

**Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið 2015**

**1.** Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2015 til 1. oktober 2017.

Semjan byggir á ein karm, sum er 2,25% fyrra árið og 1,9% seinna árið.

**2.** Tann 1. oktober í 2015 hækkar mánaðarlønin við 1,71%.

**3.** Tann 1. oktober í 2016 hækkar mánaðarlønin við 1,9%.

**4. Dagføring av § 13 um eftirløn:**
Strika núgaldandi stk. 2. "Fyri tey, sum eru sett styttri enn 3 mánaðir, verður goldin samlagstrygging. Eftirlønargjaldið verður goldið út sum løn".

**5. Sløkkiliðsstøðin**
Dagføring av § 20, stk. 1:
Vaktargjaldið fyri sløkkiliðsfólk hækkar tann 1. okt. 2015 úr 14% upp í 18%.

Nýtt stk. 4:
Gjaldið fyri mors verður 520,00 kr. Gjaldið hækkar til eina og hvørja tíð við sama % satsi, sum lønirnar hækka við.

**6. Fyribilsstarv**
§ 5, stk. 1, fyrsti setningurin verður broyttur soleiðis:
Sum fyribilsarbeiði er at skilja arbeiði, sum ikki varir longur enn í mesta lagi 6 mánaðir í einum ári.

**7.** B**arnsferð**
Dagføring av § 8:
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga.
Starvsfólk, ið vegna viðgongu er burtur frá arbeiði, hevur rætt til fráveru við løn í 24 samanhangandi vikur at rokna frá barnsburðinum. Gerst starvsfólkið óarbeiðsført vegna viðgongu, hevur starvsfólkið rætt til fráveru við løn í upp til 8 vikur fyri mettan barnsburð og í 24 vikur tilsamans.
Frá 14. viku eftir barnsburð kunnu foreldrini býta rættin til fráveru við løn ímillum sín.
Umframt nevndu sømdir kann starvsfólk fáa farloyvi alla barnsburðartíðina, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum. Í slíkum førum verður veitt henni full løn.

**Ættleiðing**
Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp í 4 vikur áðrenn tey fáa barnið og í 24 vikur tilsamans.
Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín.
Rætturin til barsilsfarloyvi við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur avgjørt, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.

**8. Arbeiðið í ólagaligum tíðarskeiðum**
Ískoyti til § 25, stk. 1: Vikuskiftið er frá fríggjadegi kl. 17.00 til mánamorgun kl. 07.00.

**9. Lønaraldur**
Ískoyti til § 36, stk. 2 um lønaraldur:
Starvsfólk fær roknaðan fullan starvsaldur, hevur tað í minsta lagi hálvt starv. Er talan um minni enn hálvt starv, verður starvsaldurin roknaður lutfalsliga.

Í stk. 3 verður sett inn: Eisini er møguleiki fyri, at starvsfólkið fær við sær fullan starvsaldur.

**10. Leiðarar**
Ískoyti í §15 – nýtt stk. 3:
Hesir leiðarar hjá Elfelagnum SEV eru undantiknir arbeiðssteðgi:
KT - leiðarin
HR - leiðarin
Deildarleiðarin á kundadeildini
Deildarleiðarin á Fyrisitingardeildini/toyminum
Deildarleiðarin á Roknskapardeildini
Deildarleiðarin á Innleggingardeildini
Deildarleiðarin á Rakstrardeildini

**11. Umflokkingar tann 1. oktober 2015**
Sosialráðgevarar flyta úr 6. lønarflokki í 7. lønarflokk
Tannarøktarar flyta úr 6. lønarflokki í 7. lønarflokk
Bókavørðir flyta úr 6. lønarflokki í 7. lønarflokk
Átaksleiðarar á Sløkkiliðsstøðini flyta úr 4. lønarflokki í 6. lønarflokk
Holdleiðarar á Sløkkiliðsstøðini verða flokkaðir í 4. lønarflokk
Dagrøktarar eru flokkaðir í 1. lønarflokki, men fáa 1 lønarstig eyka (nýtt endastig 9)

**12. Arbeiðsbólkar**
§ 21 um arbeiðsbólkar verður dagførd við niðanfyristandandi:

**1. Klinikkassistentar og tannarøktarar**
Arbeiðsbólkurin, sum arbeiðir við at endurskoða arbeiðsviðurskiftini hjá klinikkassistentum og tannarøktarum heldur fram.

**2. Endurskoðan av lønarbygnaði**
Settur verður arbeiðsbólkur umboðandi Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið at endurskoða lønarlagið hjá ymiskum starvsfólkabólkum, ið starvast á kommunala sáttmálaøkinum.
Miðað verður eftir, at arbeiðið skal verða liðugt áðrenn 1. okt. 2016.

**3. Arbeiðsbólkur viðv. havnarmeistarum- og umsjónarmonnum**
Tann 1. januar 2013 varð sett í gildi løgtingslóg um havnaloðsing. Sambært lógini um havnaloðsing er tað álagt kommununum serstøk skylda at tryggja, at skip, sum koma til føroyska havn fáa loðs.

Settur verður arbeiðsbólkur við umboðum frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og Starvsmannafelagið at hyggja eftir, í hvønn mun starvsviðurskiftini hjá havnarmeistarum og -umsjónarmonnum eru broytt í samband við tey krøv, sum kommunurnar eru álagdar sambært lógini um havnaloðsing.
Arbeiðsbólkurin skal í sáttmálaskeiðinum hyggja eftir, hvussu arbeiðið viðv. loðsing verður skipað í dag – og koma við tilmæli um, hvussu loðsing frameftir kann skipast, sum ein partur av starvsinnihaldinum hjá havnarmeistarum- og umsjónarmonnum.
Miðað verður eftir, at arbeiðið skal verða liðugt, áðrenn tann 1. oktober 2016.

**4. Veitingartrygd – SEV**
Í sáttmálaskeiðinum verður settur arbeiðsbólkur at arbeiða við samsýning fyri ávísar uppgávur í samband við veitingartrygdina hjá SEV. Arbeiðsbólkurin skal gera eitt tilmæli um, hvussu ein arbeiðsskipan skal síggja út, tá ræður um veitingartrygdina hjá SEV, harundir hvussu ein kann fyribyrgja havarí á el-skipanina og annað líknandi, sum kann viðføra skaða uppá el-skipanina – og harvið møguliga eisini streymslit.

**13.** Lønartalvur og sáttmálar o.a. verður dagført samsvarandi omanfyristandandi.

**Avtalur**
Partarnir hava gjørt ískoytisavtalu undir heitinum: Eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi.
Partarnir hava gjørt ískoytisavtalu til avtaluna um førleikamenning.
Partarnir hava gjørt avtalu um fráboðanarfreist og fráboðanarform.

*Í Tórshavn tann 17. desember 2015*

**Starvsmannafelagið** **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**